Dimmalætting

Stovnað 1878
*Ábyrgdarblaðstjóri:*
Beate L. Jensen
*Blaðstjóri:*
Georg L. Petersen
*Útgevari:*
P/F Dimmalætting

Avgreiðsla:
Mánadag til hósdag kl. 8.00-17.00
Friggjad. kl. 8.00-16.00. Leygard. er stongt.
Telefonnummar: 11212. Telefax: 10941.
Postadressa: Smyrilsvegur 13, Postboks 19,
110 Tórshavn.
e-mail: dimma@olivant.fo

**INNLATINGARFREIST FYRI LÝSINGAR**

| | Týsdagsblaðið | Mikudagsblaðið | Hósdagsblaðið | Friggjadagsblaðið | Leygardagsblaðið |
|---|---|---|---|---|---|
| 1/4 síða ella størri | Fri. kl. 12 | Mán. kl. 12 | Týs. kl. 12 | Mik. kl. 12 | Hós. kl. 12 |
| Minni enn 1/4 síða | Fri. kl. 14 | Mán. kl. 16 | Týs. kl. 16 | Mik. kl. 16 | Hós. kl. 16 |
| Smálýsingar | | | | | |
| Okkara Gulu | Má. kl. 10 | Týs. kl. 10 | Mik. kl. 10 | Hós. kl. 10 | Fri. kl. 10 |

Lítlýsingar og lýsingar við framíhjáplássi mega latast inn dagin fyri omanfyri nevndu freist.

**Vanligar treytir:** Síðustødd: 8 teigar á 41x515 mm. 1/1 síða 4.160 mm. Útsjónd: Lýsingar, sum eftir blaðsins meti kunnu mistakast fyri blaðtilfar, skulu merkjast við orðinum: Lýsing, sum verður roknað uppí lýsingarmátið. Orðið INSERAT verður ikki góðtikið. Innlatingarfreist fyri lýsingar: Sæst á skemanum til vinstru.

**Fyrivarni:** Innihaldið í lýsingunum má ikki stríða móti galdandi lógum. Ábyrgdina fyri hesum hevur lýsarin. Blaðið tekur sær rætt til at sýta at taka lýsingar við, sum blaðið metir óynsktar.

Teknisk viðurskifti og umhugsan fyri lesarum og lýsarum ger, at blaðið má tilskila sær rætt til at

1. gera smærri týdningarleysar broytingar í lýsingum hvat teksti og uppsetan viðvíkir.
2. skjóta út eina lýsing til seinni blað.

Lítlýsingar kunnu bert takast við, um tekniskú viðurskiftini loyva tað.

Endurgjald fyri møguligar villur, sum lýsarin sjálvur ikki hevur skyldina fyri, er vanliga prísavsláttur eftir blaðsins meti um virðisminkan av lýsingini, men í mesta lagi at lýsingin, ella líknandi lýsing, verður tikin við aftur seinni ókeypis. Villur, sum standast av vanaligum lýsingartilfari hevur blaðið onga ábyrgd av.

Lýsingar, sum verða inntelefoneraðar, verða altíð lisnar uppaftur, og blaðið tekur tí onga ábyrgd fyri villur, sum koma á henda hátt.

# *Misforstået velvilje*

DET lyder utroligt, men mange steder i det danske rige har man præcis de samme problemer som i Thorshavn kommune: Lange ventelister til lokale børnepasningsinstitutioner.

Det besynderlige i denne sammenhæng er, at kommunerne har over trehundrede børn i kø for at få en plads, medens man i samme kommuner står med tomme og halvtomme splinternye institutioner.

Det kommer ret og slet af, at det store pasningsproblem skyldes forældrenes krav om, at deres børn kun skal ind på institutioner i hjemmets eller arbejdspladsens nærhed, således at det er nemmere for dem, forældrene, lige at stikke hen i vuggestuen eller børnehaven at aflevere børnene.

På en måde kan man godt forstå det praktiske i aflevering af de små tidligt om morgenen og senere på dagen, når de skal afhentes. På den anden side, hvis det er selve pasningsproblemet, det hele står og falder med, er man nødt til at tage det næstbedste, hvis man ikke kan få den bedste løsning – og så være på vagt, hvis der skulle blive en ledig plads på den institution, man som forældre har skrevet øverst på ønskeseddelen, og snuppe den.

I avisernes forlyder det, at man i en ny og lige åbnet børnehave med plads til 30 børn kun har fået to børnehavebørn, og i en anden ligeledes splinterny kombineret vuggestue- og børnehave kun har fået afsat ca. halvdelen af de over hundrede pladser, institutionen er normeret til.

Det lyder utroligt, når der samtidig ligger kilometerlange ventelister på bordet i samme kommunale børnepasningsafdeling.

Det kunne nu være sjovt at høre, hvordan en kommunal valgkampagne i sådan en kommune foregår, når det kommer til børnepasningsproblemet! Kommunen har nok af børnepasningsinstitutioner, men ventelisterne vokser og vokser. Politikerne har gjort deres for at løse problemet, men vælgerne vil ikke rigtig være med på »problemløsningen«, som det så populært hedder i dag.

Når man ikke tager imod hjælpen, en kommune prøver at give sine borgere, må der være et eller ander, der kikser borgerne og kommunen imellem.

På talefod er man, men man snakker ikke samme sprog. Man vil gerne løse problemet, men måden, det bliver løst på, accepterer man ikke. I virkeligheden skulle man tro, at det hovedsagelig var pasningen, det drejede sig om, men på grund af den forkælelse, kommunen har haft tendens til at udøve, har man satset på en lidt anderledes facon at gribe sagen an. Resultatet har ikke været særlig tilfredsstillende, set fra fra børnefamiliernes vinkel.

Man har nedvurderet kommunens velvilje, istedet for at tage imod de tilbud, der gives.



## Orðið

*Les Filippibr. 1,23-26*

**VIRKA, MEÐAN TÚ VÆNTAR**

*»Og tit, brøður, troyttist ikki av at gera tað, ið gott er!«* *2. Tessalonikabr. 3,13*

TRÚGVANDI Í KRISTUSI hava náttúrligan longsul eftir Himmalinum. Hvør okkara man ikki hava kent »heimlongsul í dýrdina« onkuntíð í lívinum? Men ynski sum hetta eigur ongantíð fáa okkum at gloyma ábyrgd okkara her á fold.

Stóri evangeliiboðarin George Whitefield greiddi nøkrum vinmonnum frá tvørleikunum í evangelisku tænastuni. Hann segði seg hugtungan av byrðunum og var glaður, at arbeiðið skjótt var at enda komið, og at hann fór burtur av hesum jørðiska »leikpalli« at verða hjá Kristusi. Hinir játtaðu seg hava líknandi kenslur – allir uttan ein; Tennant æt hann. Tá ið Whitefield legði tað til merkis, klappaði hann honum á knæið og helt fyri: »Ja, bróðir Tennant, vit halda teg vera tann elsta av okkum; fegnast tú ikki í hugsanini um, at tíðin er so nær fyri hond, tá ið tú verður kallaður *heim?*« Gamli maðurin svaraði eitt sindur kvettið, at tí fekk hann illa tikið undir við. Kroystur eftir gjøllari skoytti hann uppí: »Eg havi einki við deyðan at gera. Uppgáva mín er at liva lívið, so leingi tað ber til, og so væl tað ber til, og at tæna Frelsara mínum, so væl tað ber mær til, inntil Hann heldur, tíðin er komin at kalla meg *heim.*« Whitefield tók svarið sum mjúka ábreiðslu frá Harranum, og tað hjálpti honum at halda á í arbeiði sínum róliga og tolið.

Gott er at vænta gleðina at hitta gamlar vinir aftur, sum vit ikki hava sæð langa tíð, ella at skoða framyvir til tiltrongda »avloysing«. Men vit mugu ongantíð gerast so íðin eftir tí, at vit slaka í dagligu ábyrgd okkara. Sama er á andaligu víddunum, meðan vit bíða eftir heimferðini – latið okkum síggja til í trúfesti at virka verkið væl.

© -prp-

## Viðmerkingar



Sámal P. í Grund, landsstýrismaður, hevur lagt eina nýggja linju í Tinganesi. Síðan hann kom, hava fýra høgir almennir stjórar

# Avdúkaðu seg sjálvar

fingið sekkin.

Grundgevingarnar hava verið, at antin róktu teir ikki uppgávu sína til fulnar, ella skuldi umsitingin fáast liðiligari.

Í krókunum hevur verið sagt, at nú rúka javnaðarstjórarnir, teir sum Javnaðarflokkurin fekk í starv vegna politiskan lit. Eingin hevur rættiliga torað at sagt tað hart, tí ein tílík skuldseting er rættiliga grov.

Men mín sann, um ikki javnaðarmenninir blottaðu seg fyri opnari mikrofon í tinginum. Vilhelm Johannesen og Jóannes Eidesgaard løgdu landsstýrismannin undir at hava fingið stjórarnar úr starvi, tí teir vóru javnaðarmenn. So varð endaliga staðfest, at stjórarnir vóru settir í starv út frá einari kvalifikatión – politiskum liti – javnaðarliti.

So skilja vit eisini støðuna hjá Sámal P. í Grund enn betur, tí tað skulu sjálvsagt ikki vera politiskar kvalifikatiónir, sum skulu stýra skattaborgarans peningi.

So vita vit eisini, at framyvir má tað almenna vera á varðhaldi, tá stjórar verða settir, um Javnaðarflokkurin hevur málið um hendi í Tinganesi. Tá telja, sambært egnum úttalilsum, ikki fakligar kvalifikatiónir, men politiskar. Ikki løgið, at tað hevur virkað so illa innan almenna sektorin.

Hattin av fyri Sámal Peturi.

**Georg L. Petersen**

## Andlát og tøkkir

†

Kunngjørt verður, at okkara kæra mamma, vermamma og omma

***Elin Petersen***
Klaksvík

andaðist friggjadagin 22. november, 78 ára gomul. Jarðarferðin verður úr heiminum í Christianskirkjuna týsdagin 26. november kl. 12.30.

Familjunnar vegna
*Finnbjørg og Jóna*

**Tøkk**

Hjartaliga takka vit øllum, sum á ymiskan hátt mintust góða mann og pápa okkara

***Chris Joensen***

við jarðarferðina. Takk fyri telefonsamrøður og peningagávur til felagið fyri Alzheimers sjúkuna. Tøkk, øll somul.

*Hanna og Margaret*

## Viðmerkingar



**Kommunalpolitikararnir tosa um tann ovurstóra trupulleika, kommunuskuldin er, men tað er væl skiljandi, at teir hava torført við at ávísa møguligar loysnir.**

**Um vit ásanna, at elframleiðsla er ein tænasta, ið boðin verður út til marknaðartreytir, og ikki er nøkur kommunal tænasta, er vert at umhugsa, hvussu farast skal fram við at privatisera SEV.**

# Buggeli, buggeli

## *– Hvussu kann SEV privatiserast?*

Vit hava tann ovurstóra fyrimun sum eftirbátur – við fleiri bátslongdum – tá ræður um privatisering, at vit kunnu læra av mistøkunum hjá øðrum og nýta teirra royndir til okkara fyrimun. Samanumtikið eru trý ting at hugsa um.

- Hvussu fáa teir almennu kassarnir sum mest fyri privatiseringina? Hetta er jú fólksins ogn, talan er um.
- Hvussu tryggja vit, at marknaðurin verður vælvirkandi og kappingarførur eftir privatiseringina? Eitt privat monopol er jú ikki pætti frægari enn eitt alment.
- Hvussu tryggja vit brúkara og starvsfólk? Hugsast má um framtíðar prísleg u, umhvørvi og arbeiðsumstøður.

### Framtíðar elmarknaður

Sølan av ravmagni verður sjálvsagt í hondunum á einum felag, ið eigur linjurnar og røkir kundasambandið. Prísurin, brúkarin skal gjalda, verður settur fyri eitt ávíst tíðarskeið í senn, t.d. trý ár. Sparingar í hesum tíðarskeiði koma linjufelagnum til góðar, men tá skeiðið er runnið, ásetur eitt prís- og monopoleftirlit ein nýggjan prís fyri næsta tíðarskeiðið, ið tryggjar, at sparingarnar koma brúkaranum til góðar gjøgnum ein lægri elprís. Vit kunnu kalla hetta linjufelagið pf. SEV.

Tey størru framleiðsluverkini verða eisini skipað sum partafeløg, pf. Eiðisverkið, pf. Sundsverkið o.s.fr. Tey smáu elverkini kunnu antin leggjast undir tey størru ella undir linjufelagið. Samstundis verður einum og hvørjum frítt fyri at stovna síni egnu elvirki við t.d. vindmyllum. Pf. SEV fær skyldu at keypa frá øllum framleiðarunum fyri sama prís, og vit sleppa undan at hoyra meira til hetta evindaliga kjak um, hvat mundi ella kundi verið gjørt av hesum og hasum.

Prísurin, elframleiðararnir fáa frá pf. SEV, verður somuleiðis ásettur fyri eitt áramál í senn. Hugt verður sjálvsagt at vektaða meðalframleiðsluprísinum. Tey elverkini, ið rationalisera mest, fáa sostatt mest í sín part. Tessvegna má prís- og monopoleftirlitið ansa eftir, at verkini ikki gera sínámillum avtalur, ella at somu eigarar hava avgerandi ávirkan í fleiri verkum – tey skulu jú kappast.

### Leiðin fram

Tá elverkini eru skipað sum partafeløg, verða partabrøvini privatiserað. Munurin á framleiðslukostnaði ger sjálvsagt, at vatnorkuverkini upp á seg eru meira verd, men av tí at hetta speglast í tí, sum fæst fyri partabrøvini, fer hvør króna í partapeningi at geva sama avkast. Sum frá líður, ber tó til hjá verkunum at rationalisera seg fram til eitt betri avkast.

Gerast skal elverkunum greitt, hvat vit vænta okkum av teimum: Vinningurin skal koma bæði starvsfólki, leiðslu og partaeigarum til góðar. Skattur verður sjálvsagt eisini goldin av vinninginum. Men vit mugu eisini seta krøv til umhvørvi og nýmótans leiðsluhátt, so t.d. starvsfólk verða umboðað í nevndunum og verða lønt eftir avriki. Brúkarin má eisini umboðast onkursvegna.

Spurningurin um framtíðar útbyggingar verðu sostatt avgjørdur av fólki, sum sjálvi hava pengar í váða. Tey mugu gera av, um ein íløga loysir seg, og sjálvi taka fylgjurnar av hesum – uttan at Palliba og Marsanna sum kommunalir skattgjaldarar skulu taka um endan. Hví havi eg álit á, at privatiserað virki kunnu verða okkum øllum til fyrimunar? Jú, hyggið at teimum báðum reiðarìunum, sum Palliba og Marsanna eiga. Annað, Smyril Line, hevur frálík úrslit, og tey bæði hava langt síðani spart partabrøvin inn aftur gjøgnum avsláttarskipanina fyri partaeigarar. Á hinum, Strandferðsluni, ber ikki so frætt sum til at siga, hvussu stórar inntøkurnar eru. Tey oyruni, Palliba spardi hjá Smyril Line, fær Strandferðslan sum eykajáttan.

### Upsaprísur og Eiðisverkið

Ein kapitalmarknaður skal til at skipa eina slíka privatisering. Hann er ikki stórt øðrvísi enn ein fiskamarknaður, bert eru iskassarnir skiftir um við telduskipanir. Hugsanin er, at tað skal vera lætt og smidligt at keypa og selja partabrøvini og hjá hesum sum øðrum partafeløgum at fíggja nýggjar íløgur gjøgnum partabrævasølu. Nú vit bert hava tveir stórar peningastovnar, fer hetta at tryggja okkum eina sunna kapping um uppsparingina.

Nógv verða helst um boðið at gerast partaeigarar. Svenska elfyritøkan Vattenfall hevur síðstu árini gjørt íløgur fyri nógvar milliardir runt um í Europa, millum annað í NESA, sum Gentofte Kommune liggur fyri at selja partabrøv í. Teirra styrki er, at teir taka við sær sín ovurhonds kunnleika og royndir. Virkini, teir eiga í, fáa stóra nyttu burturúr hesum. Mong onnur elvirki, motor- og vindmylluframleiðarar, oljufeløg o.s.fr. kunnu á henda hátt tryggja okkum bæði pengar fyri partabrøvini og týðandi kunnleika. Harumframt fara núverandi lánveitarar at vilja ogna sær partabrøv – kann SEV forrenta lán, kunnu elverkini tað sama forrenta partapening gjøgnum vinningsbýti. At enda eru okkara egnu pengastovnar, tryggingar og grunnar helst áhugað.

Eitt kunnu vit læra av eystureuropearum, og tað er, hvussu vit tryggja, at Palliba og Marsanna eisini framyvir eiga í elframleiðsluni. Teir hava nevniliga ofta býtt út keypsbrøv, ið kunnu nýtast til at keypa partabrøv í privatiseraðum fyritøkum. Hugsa vit okkum – og hetta er eitt heilt tilvildarligt tal – at 100 milliónir netto fáast fyri SEV, kunnu vit lata kommunalu skattgjaldarunum tær 30. Eru skattgjaldararnir 30.000 í tali, verða 1.000 krónur í part til bæði Palliba, Marsannu og Fossadun. Tær kunnu so setast í eitt ella fleiri av elverkunum. Framyvir fer Marsanna sostatt ikki bert at lurta eftir andlátum og bingolýsingum, tá tíðindini eru, men fer eisini at vita, um ikki Ívar veit at siga frá einari kurshækkan hjá Eiðisverkinum.

Síðani verður lutafelagið SEV uppløyst, skuldin, ið ikki verður yvirtikin av elfeløgunum, goldin, felagið uppløyst sambært viðtøkunum, og yvirskotið latið kommununum.

### Ognardemokrati

Samanumtikið ber ein privatisering á henda hátt í sær:

- Leiðsla og starvsfólk motiverast av felags áhugamálum og møguleika fyri vinningi.
- Kapping og útlendskar royndir føra til lægri elprís.
- Tapsvandi hvílir ikki longur á skattgjaldaranum.
- Palliba og Marsanna sleppa eisini at vera við.
- Og ikki minst: Vit sleppa undan hasum alinlongu greinunum hjá misskiltum – teir kunnu jú bara royna sjálvir.

**Johannes M. Olsen**
fólkatingslimur



# Oljan – ein framtíðar møguleiki hjá Havnini

Gjøgnum árini eru stórar íløgur gjørdar í Tórshavnar havn. Eftir at útlitini kanska ikki hava verið tey bestu fyri, at hesar íløgur fóru at koma til sín rætt, sær alt so nógv øðrvísi út í dag.

Við bjartskygni eru vit nú á einum vegamóti, ið møguliga endar við, at Føroyar verða ein oljutjóð eins og so mangar aðrar - teirra millum eisini fleiri av grannalondum okkara.

Enn vita vit ikki, um oljan er har, ella um hon kemur. Men umráðandi er, at vit eru til reiðar at taka ímóti henni, *skuldi* hon ein dag verið har.

Í so máta eru vit í Suðurstreymoy sera væl fyri, við tað at hugt hevur verið frameftir, tá útbyggingar á havnaøkinum eru gjørdar. Og er nakað stað í Føroyum til reiðar at taka ímóti einari møguligari framtíðar oljuvinnu, so er tað Havnin.

Tí er eisini umráðandi, at hesin gylti framtíðarmøguleiki verður royndur til fulnar. Sambandsflokkurin vil virka fyri, at Tórshavnar havn kemur at standa í fremstu røð, tá vit skulu bjóða okkum fram sum oljuútgerðarhavn, ella hvør tørvurin nú einaferð verður í hesi stóru og spennandi vinnu.

Mitt í landinum við øllum neyðugum havnarhentleikum, skipasmiðju og øllum hugsandi tænastuvinnu, er høvuðsstaðurin tað mest upplagda evnið, nú oljuvinnan bankar uppá.

**Heðin Mortensen**
býráðslimur

Minnist til smáfuglarnar

